Olaf Olsen, vinnulívsmaður:

# Privatmonopol verri enn statsmonopol



*- Eg ivist stórliga í, um alt, sum fer fram í dag við sølu og samanleggingum í stórar konsernir, fer at vera hildið at vera tað rætta um nøkur ár, sigur Olaf Olsen, sum hevur verið reiðari og stjóri í mong ár*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Tað er ikki vist, at alt, sum fer fram í dag við sølu og samanleggingum í stórar konsernir, verður hildið at vera rætt um nøkur ár, sigur Olaf Olsen, sum heldur, at bylgjan, sum er yvir okkara parti av heiminum, er farin at líkjast privatmonopoli, sum hann heldur vera verri enn statsmonopol**

SAMANLEGGINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú fyritøkur javnan verða seldar og lagdar aftrat øðrum fyritøkum, hava vit spurt Olaf Olsen, sum hevur verið reiðari og stjóri í mong ár, hvat hann heldur um hesa gongd.

- Tað er ein generell bylgja, sum er uppi í tíðini, har at kalla alt skal leggjast saman. Vit kenna planbúskapin og statsmonopolini, sum eitt nú eyðkendu londini eystanfyri. Eg haldi, at tað, sum hendir í dag, meira og meira líkist privatmonopoli, har fyritøkur gerast so stórar og sterkar, at sjálvt stjórnirnar í einum landi, sum er illa fyri, kunnu verða við undirlutan.

Olaf vísir á, at fær ein stór privat fyritøka við stórari fíggjarorku og stórum aktiviteti ikki sín vilja í einum landi, sum er verri fyri, kann hon bara hótta við at rýma, og tá kann hetta gerast rættiliga vandamikið fyri eitt samfelag.

- Eg ivist stórliga í, um alt, sum fer fram í dag við sølu og samanleggingum, fer at vera hildið at vera tað rætta um nøkur ár.

Hann heldur, at bylgjan, sum er yvir okkara parti av heiminum í løtuni, alt meira er farin at líkjast privatmonopoli, sum hann heldur vera verri enn statsmonopol.

- Eg trúgvi, at hesar samanleggingar í stórar konsernir avgjørt fara at vísa seg við sínum negativu síðum, sum árini ganga. Tíðin er broytt, og tað er hugburðurin eisini, sigur Olaf Olsen.

### Tað er freistandi

Meðan útlendingar hava keypt ognir upp í Føroyum, hoyrist lítið um, at føroyingar gera nakrar serligar íløgur í øðrum londum. Eisini okkara nærmasti granni, Ísland, sum vit plaga at samanbera okkum við, hevur gjørt stórar íløgur í útlandinum seinastu árini – og eisini í Føroyum.

Olaf Olsen sigur seg ikki vita um nakrar serligar íløgur hjá føroyingum uttanlands, men nevnir, at P/F Vónin eitt nú hevur gjørt íløgur í Grønlandi og Kanada.

Spurdur, um hann heldur, at sølur av partapeningi og feløgum snúgva seg um, at nakrir fáir vilja skúma róman, sigur hann:

- Nei, tað veit eg ikki, men tað er sjálvandi freistandi hjá teimum at selja, sum fáa eitt gott tilboð - og tá er tað líka mikið, hvønn vit tosa um.

### Hugburðurin broyttur

Í nøkur ár var Olaf Olsen løgtingsmaður, og eitt skifti var hann eisini landsstýrismaður.

Sum heild, hevur áskoðanin hjá føroyingum verið, at útlendingar skulu ikki sita við meirilutanum í føroyskum vinnulívi.

Eru karmarnir nógv broyttir, nú útlendsk feløg í størri og størri mun vilja keypa upp føroyskt vinnulív, spurdu vit vinnulívsmannin:

- Karmarnir eru broyttir nakað, tó ikki so nógv. Eg haldi, at hetta meira snýr seg um at útnytta karmarnar, sum eru – nú meira enn áður.

Olaf Olsen vísir á, at tá ið ræður um veiðiliðið, kunnu útlendingar ikki eiga meirilutan.

- Men í øðrum førum kunnu teir eiga meirilutan – í summum førum við ávísum avmarkingum, sigur hann og vísir á, at útlendingar saktans kunnu keypa meirilutan av partapeninginum í feløgunum, sum eiga Havsbrún.

### Óvitandi um Havsbrún

At enda sigur Olaf Olsen seg slett ikki duga at meta um, hvat fer at spyrjast burtur úr áhuganum hjá norðmonnum í Havsbrún.

- Persónliga eigi eg einki í felagnum, men Vónin eigur ein lítlan part av partapeninginum í Dagsbrún, sum er eitt av trimum feløgum aftanfyri Føroya Fiskaídnaði, sum eigur meirilutan av partabrøvunum í Havsbrún.

# Harry handar Suna pengarnar



*Harry Benjaminsen, formaður í Tofta Arbeiðsmannafelag, handar formanninum í Reyða Krossi, Føroya Deild, tær 5.000 krónurnar, sum felagið letur til hjálpararbeiðið í Fjareystri*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

NEYÐHJÁLP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Formaðurin í Tofta Arbeiðsmannafelag, Harry Benjaminsen, var fram við á skrivstovuni hjá Reyða Krossi Føroya Deild, mánadagin, har hann handaði formanninum, Suna Winther, tær 5.000 krónurnar, sum arbeiðsmenn og arbeiðskvinnur á Toftum hava samtykt at veita til hjálpararbeiðið eftir herviligu vanlukkurnar, sum stóðst av flóðalduni í Fjareystri.

Harry Benjaminsen sigur seg vóna, at onnur arbeiðarafeløg eisini fara at stuðla hjálpararbeiðinum.

Suni Winther, formaður í Reyða Krossi, Føroya Deild, er fegin um, at eisini arbeiðafeløg vilja stuðla hjálpararbeiðnum.

- Eg vóni, at hetta er byrjanin til, at fleiri feløg fara at fylgja Tofta Arbeiðsmannafelag og stuðla innsavningini til vanlukkuraktu økini, sigur Suni Winther.

# Havsbrún: Einki nýtt tilboð

**Poul Hansen, advokatur, sum er nevndarformaður í Havsbrún og Føroya Fiskiídnaði, sum eigur 75% av partapeninginum í Havsbrún, sigur, at einki nýtt tilboð er komið uppá Havsbrún í Fuglafirði**

HAVSBRÚN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í desember kom fram, at norska felagið, Weskon Asa, sum hevur fleiri virkir av líknandi slagi sum Havsbrún, hevði boðið feløgunum, sum eiga virkið í Fuglafirði, 180 miljónir krónur fyri meirilutan av partapeninginum, um tey vildu selja.

Nevndarformaðurin í Havsbrún og Føroya Fiskiídnaði, sum eigur meirilutan av partapeninginum í Havsbrún, mælti eigarunum frá at selja.

Seinni í desember frættu vit aftur, at Weskon Asa aftur hevði verið við einum tilboði, sum nú ljóðaði uppá 200 miljónir krónur.

Feløgini, sum standa aftanfyri Føroya Fiskiídnað, eru Dagsbrún, Sildasølan og Sildaskip.

Eftir at norðmenn høvdu boðið tær 200 miljónir krónurnar, tóku feløgini málið upp til viðgerðar, men úrslitið av viðgerðini var, at feløgini lótu seg ikki freista til at selja.

Poul Hansen, advokatur, sum bæði er nevndarformaður í Føroya Fiskiídnaði og Havsbrún, sigur, at hóast full semja ikki er millum allar eigararnar, so samtykti ein meiriluti ikki at taka av tilboðnum frá norðmonnum.

– Men øll tilboð, sum koma, verða sjálvsagt viðgjørd, segði hann.

### Einki nýtt boð

Poul Hansen sigur í stuttari viðmerking, at einki nýtt boð er komið úr Noregi, síðan tilboðið upp á tær 200 miljónir krónurnar kom.

- Sostatt er heldur einki nýtt í málinum í løtuni, segði nevndarformaðurin við Sosialin fyrrapartin mikudagin.

Dagsbrún eigur 45 % av partapeninginum í Føroya Fiskiídnaði og tvey onnur feløg, Sildasølan og Sildaskip, eiga 55 %.

Tilsamans eigur Føroya Fiskiídnaður 75% av partapeninginum í Havsbrún í Fuglafirði.



*- Einki nýtt boð er komið úr Noregi, síðan tilboðið upp á tær 200 miljónir krónurnar kom. Sostatt er heldur einki nýtt í málinum í løtuni, sigur nevndarformaðurin, Poul Hansen*